

*Tað var ein stór mannamúgva, sum fagnaði nýklæktu steypavinnnarunum úr Sundalagnum*

Vagn Morh Mortensen sendi hetta sama fríspark hegnisliga í netið, so nú var støðan knappliga 4-3.

Og enn vóru fimm minuttir eftir at leika umframt tíðina, sum løgd var aftrat. Tað skuldi vísa seg at verða aðrir fimm minuttir, men hetta gjørdust hendingarríkir minuttir, tí um liðini høvdu skorað tvey – ella enntá trý – mál í part hesa løtuna, so hevði einki órættvíst verið í tí. Liðini snøgt sagt vassaðu í møguleikum síðstu løtuna, men ógvuliga gott málmansspæl frá báðum málmonnum forðaðu fyri eini enn størri málveitslu.

Um dystinum vantaði nakað í flótandi fótbóltsspæli, so var hetta ríkiliga vigað upp fyri í spenningi, dramatikki og flottum detaljum. Alt í alt ein fantastisk finala.



*Løgmaður handar liðskiparanum hjá EB/Streymi, Egil á Bø, løgmanssteypið – sjónliga prógvið fyri, at felagsliðið er steypavinnari 2007*



*Soren Anghel við løgmanssteypinum. Hann setti EB/Streym í gongd við at skora trygt upp á brotsspark longu í øðrum minutti*

# Rókur til Helsingør

**Helsingør Elite 3000 Håndbold hevur gjørt sáttmála við 20-ára gamla Rók Akralíð, sum nú fer at royna seg í donsku fyrstu deild**

HONDBÓLTUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Rókur Akralíð, sum herfyri var í FCK, har hann skuldi royndarvenja, hevur nú gjørt sáttmála við Helsingør Elite 3000, har sum Heini Hanusarson framman undan leikar.

Venjarin, Søren Bach, er ógvuliga fegin um at hava fingið unga føroyingin í hópin, og er ikki í iva um menningarpotentialið hjá Róki, eins og hansara dygdir og komandi týdning fyri liðið.

Rókur er ein leikari, sum hóast sín unga aldur er ógvuliga kropssterkur. Hann er stórur og sterkur og verður ein rættiliga skothóttan útifrá. Vit gleða okkum til samstarvið við Rók og vilja sjálvandi arbeiða fyri at fáa tað besta burtur úr bæði fyri hann og liðið. Hondbóltur í Føroyum er ógvuliga øðrvísi enn í Danmark, so tað tekur helst sína tíð at venja seg við, men við tíðini verður hann heilt vist fastur maður á liðnum, sigur venjarin á heimasíðuni hjá felagnum.



*Venjarin Søren Bach saman við Róki Akralíð*